## Skálaberg aftur av túri



Seinasta hósdag kom klaksvíkstrolarin Skálaberg aftur av túri. Teir hava roynt í Irmingarhavinum, og veiðan liggur um 820 tons av skráskornum kongafiski. 29 mans hava verið við Skálabergi hendan túrin, og skipari hevur verið Róin Biskopsstø í Havn. Væntandi loysir Skálaberg aftur um nakrar dagar, og tá verður farið í Barentshavið at royna. Skálaberg fór úr Føroyum 24. apríl, og hesin túrurin hevur soleiðis vart tað mesta av tveimum mánaðum.

## MaJazz í Føroyum

Danska rútmiska kórið MaJazz kemur á vitjan í Føroyum í eina viku fyrst í juli mánaða. Mong í kórinum hava sæð myndir úr Føroyum, men hava ongantíð verið her áður. Tí gleða tey seg nógv til kórið kemur til Føroya 30. Juni. Tey eru spent at síggja føroysku náttúruna, ið sjálvsagt er heilt øðrvísi enn tað, tey eru von við. Tey fara at hava fleiri konsertir í Føroyum og hava samstarv við føroyska kórið Vox.

## Lítil sildaveiða



*Sildafiskiskapurin í íslendskum sjógvi hevur verið slakur í summmar*

*Mynd: Mourits M. Joensen*

**Higartil hevur lítil veiða verið eftir norðhavssild í íslendskum sjógvi**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sambært norska fiskivinnublaðnum Fiskaren, halda íslendingar, at 2,5 miljónir tons av norðhavssild standa í íslendskum sjógvi.

Kortini er veiðan lítil.

Tá farið var um hálvan juni, høvdu íslendsk skip bert fiskað 9.740 tons av norðhavssild av eini samlaðari kvotu upp á 148.629 tons.

Skipið, sum tá hevði fiskað størstu nøgdirnar, var ”Hákon”, ið hevði fingið tilsamans 2.338 tons.

Soleiðis høvdu íslendingar 138.889 tons eftir av síni kvotu av norðhavssild, tá farið var um hálvan juni.

## Fiskiveiðan økt

**Íslendska fiskiveiðan er nógv økt higartil í ár. Vøksturin stavar serliga frá veiðini eftir pelagiskum fiskasløgum**

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Í tíðarskeiðinum januar til mai í ár øktist íslendska fiskiveiðan við heili 14% í mun til somu mánaðir í fjør.

Tað er í fyrsta lagi veiðan eftir pelagiskum fiskasløgum, sum er økt.

Fimm teir fyrstu mánaðirnar í fjør var samlaða pelagiska veiðan hjá íslendskum skipum 398.000 tons ímóti 503.000 tonsum somu mánaðir í ár.

# Halgerð vann skot

**Tá Halgerð gekk og keddi seg ein dagin í mars, spurdi maður hennara, hví hon ikki bara fór á bingo. – Hon fór og kom aftur við høvuðsvinninginum, sum var ein ferð fyri tvey í bili við Norrønu til Skotlands**

UTTANLANDSFERÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á fyrstu ferðini við Norrønu til Scrabster hittu vit fýra fólk, sum fóru til Skotlands at ferðast. Hesi vóru hjúnini, Jóhanna og Ingvard Olsen av Glyvrum og Halgerð og Gunnar Reynslág av Argjum.

Jóhanna og Halgerð eru systrar, og Ingvard og Gunnar eru trímenningar.

Søgan aftanfyri hesa ferðina byrjar eitt kvøldið seint í mars í ár.

### Á bingo

- Halgerð gekk og keddi seg, tá eg spurdi, hví hon ikki bara fór á bingo, sum lýst var at vera í B36-húsinum hetta kvøldið.

Gunnar ásannar, at tað loysti seg at “senda” konu sína avstað, tí tá hon kom aftur, hevði hon vunnið høvuðsvinningin, sum var ein ferð fyri tvey við bili til Skotlands við Norrønu.

- Vit eru nógv saman við Jóhonnu og Ingvardi, so vit spurdu tey, um tey høvdu hug at koma út at ferðast saman við okkum.

Þørini hava fleiri ferðir ferðast saman, bæði her heima í Føroyum, men eisini uttanlands, eitt nú í Noregi, Skotlandi og Íslandi.

- Vit síggjast ofta, og vit hugna okkum ordiliga, tá vit eru saman. Er ikki veður til annað, sita vit inni og spæla kort og onnur spøl, tá vit eru saman.

Tá tey vóru yngri, og børnini ikki vóru vaksin, vóru tey ofta útferðir saman, og tá vóru børnini sjálvsagt við.

- Nú eru vit meira leys, og tað er so sanniliga eisini stuttligt at ferðast saman við sínum javnaldrum og vinfólki annars, eru tey tey fýra samd um.

### Nairn-karavan

Hendan ferðin hjá Halgerð, Gunnari, Jóhonnu og Ingvardi verður í húsvogni í Nairn, ella Nairn-karavanum, ið er eitt av fleiri tilboðum, sum Smyril Line hevur til ferðandi, ið hava hug at ferðast í Skotlandi.

- Vit verða 10 dagar heimanífrá og fara soleiðis heimaftur við Norrønu úr Scrabster mikudagin.

Tað er serliga Halgerð, ið hevur studerað Nairn-karavanirnar væl, og hon veit at siga, at húsvognurin, sum tey skulu búgva í, hevur tvey sovikømur, stovu, køk og baðirúm.



- Vit hava ikki roynt hetta áður, men hetta sær ógvuliga gott út. Hetta eru ikki vognar á hjólum, men meira sum góðar barakkir. Talan er soleiðis um eina heila bygd – eina karavanbygd, sigur Halgerð.

Gunnar hevur eina systir, sum býr heilt niðri í Luton í Onglandi, men á hesi ferðini fara tey ikki at vitja hana.

- Vit hava einar tvær ferðir koyrt longu leiðina niður til Luton at vitja systir mína, sum var gift onglendingi, men sum nú er einkja, sigur Gunnar Reynslág.

### Gleddu seg

Tá vit hittu tey fýra umborð á Norrønu, vóru tey sera spent upp á ferðina í Nairn.

- Hetta er eitt barnavinarligt øki við nógvum møguleikum, sigur Jóhanna.

Tá vit spyrja hana, um tað nyttar nakað fyri tey fýra, sum ikki eru børn longur, at fara til eitt barnavinarligt øki, er hon skjót at svara:

- Hóast vit eru bæði ommur og abbar, gleða vit okkum sum børn til hesa ferðina – ella sum sagt verður í onkrari av lýsingunum um at ferðast: Gleð teg sum eitt barn.

Og tað gera tey fýra, eingin ivi um tað.

### Ymiskt lív

Meðan Ingvard hevur arbeitt hjá Føroya Tele – ella Telefonverk Føroya Løgtings - at kalla alla sína tíð, hevur Gunnar tikist við eitt sindur av hvørjum.

- Eg byrjaði sum linjumaður, síðan sum kaðalmaður, og at enda var eg formaður á kaðaldeildini.

## FAKTA

| | |
|---|---|
| Bygd: | Flender Werft, Lubeck |
| Sjósett: | 24. august 2002 |
| Latin SL: | 7. apríl 2003 |
| Í sigling: | 10. apríl 2003 |
| BRT: | 36.000 |
| Longd: | 164 metrar |
| Breidd: | 30 metrar |
| Ferð: | 21 sjómíl |
| Ferðafólk: | 1.482 |
| Bilar: | 800 |